LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 18. mai 2021
J.Nr.: LUM-16- 21/06912-12
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit

viðvíkjandi klagu um avgerð hjá Almannamálaráðnum at nokta innlit í eitt skjal í.s.v. val av stýrislimum í Bústaðir

Við telduposti, dagfestur 26. apríl 2021, hevur A, journalistur hjá Kringvarpi Føroya, sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "...
> Vegna Aktueltdeildina í Kringvarpinum vil eg hervið kæra avgerðina hjá Almannamálaráðnum um at nokta innlit í skjal, sum umrøður val av stýrislimum í Bústaðir.
>
> Samskiftið við AMR er í hesum telduposttráði, sí niðast.
>
> Sum tit síggja í okkara seinasta telduposti til aðalstjóran í AMR, so upplýsa keldur fyri okkum, at har liggur eitt frámæli/notat, har ráðið ivast í valinum av ... til stýrislim í Bústaðir.
>
> Vit valdu alla tíðina "at spæla við opnum kortum" í samskiftinum við AMR. Men aðalráðið tvíheldur um at nokta innlit. Og - sum eisini framgongur av samskiftinum - vilja tey heldur ikki svara ítøkiligum spurningum um tað sama.
>
> Vit meta málið vera prinsipielt og av almennum áhuga - og tí verður tað lagt fyri Umboðsmannin til støðutakan.
> ..."

## Málsgongd

Saman við klaguni varð soljóðandi teldupostsamskifti millum klagaran og Almannamálaráðið, sent umboðsmanninum:

Tann 19. apríl 2021 sendi klagarin soljóðandi teldupost til Almannamálaráðið:

> "...
> Eg havi tveir skjótar fyrispurningar ísbv val av stýrislimum í Bústaðir:
>
> -Sum skilst hevur landsstýriskvinnan valt tríggjar nýggjar stýrislimir í Bústaðir (eg lesi nýggju lógina soleiðis, at tað nú verður víst til lstm í almannamálum, tá nevnd skal veljast). Hvørji eru hesi trý, og hvør innstilling liggur aftanfyri valið?
> -Sum skilst fyriliggja viðmerkingar til innstillingina frá starvsfólki og/ella leiðslu í AMR. Kanst tú vátta, at tað er soleiðis? Og um ja, hvørjar eru so hesar viðmerkingar?
> ..."

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Tann 19. apríl 2021 svaraði Almannamálaráðið:

> “...
> Tíðindaskriv er júst sent út um nýggja stýrið. Innlit verður ikki latið í innanhýsis tilmæli.
> ...”

Tann 21. apríl 2021 sendi Almannamálaráðið ískoyti til svarið tann 19. apríl:

> “...
> Tú átti eisini at fingið málsyvirlitið, so tað er viðfest her. Hald mær til góðar!
> ...”

Tann 21. apríl 2021 sendi klagarin soljóðandi svar til Almannamálaráðið:

> “...
> Takk fyri ískoytis-upplýsingarnar, ið eg júst skuldi til at spyrja eftir.
>
> Eg vil hervið biðja um alment innlit í skjalið "Viðurskifti viðvíkjandi vali av stýrislimi í Húsalánsgrunnin", dok.dato 13.04.21, undir málsyvirlitinum 21/06081.
> ...”

Tann 21. apríl 2021 svaraði Almannamálaráðið:

> “...
> Almannamálaráðið gevur ikki innlit í innanhýsis arbeiðsskjøl, uttan so at tey eru fevnd av § 8 ella 11 í lógini um innlit í fyrisitingina. Ongi slík skjøl eru skrásett í málinum um at tilnevna nýtt stýri fyri Bústaðir.
> ...”

Tann 21. apríl 2021 svaraði klagarin Almannamálaráðnum soleiðis:

> “...
> Eg eri ikki samdur í tínari niðurstøðu. Fleiri orsøkir eru til tess:
>
> 1) Eg haldi gott at man kann grundgeva fyri, at innlit eigur at gevast smb. §11
>
> 2) Málið er neyvan at rokna sum 'innanhýsis' longur, einfalt tíð at avgerðin í málinum er almenn
>
> 3) Fyrisitingin hevur altíð møguleika at geva meirinnlit, opinleikanum at gagni
>
> Lat meg frætta, hvat tú heldur.
>
> Eg haldi at málið er nokkso prinsipielt, og tí verður tað latið Umboðsmanninum, um so er at tú heldur fast um tína støðu.
> …”

Tann 22. apríl 2021 svaraði Almannamálaráðið:

> "...
> Sambært § 11 í innlitslógini eigur at verða givið innlit í skjøl, um hesi innihalda upplýsingar um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið. Mett verður ikki, at upplýsingar eru í skjalinum, ið innlit verður biðið um, ið eru av stórum týdningi fyri málið. Hvørt sjálvt málið ikki longur er innanhýsis er ikki av týdningi í hesum føri. Skjalið er framvegis eitt innanhýsis skjal, ið er fevnt at ásetingini í § 7, og mett verður ikki, at innlit eigur at verða givið í skjalið vísandi til § 11 í innlitslógini ella regluna um meirinnlit.
>
> Hildið verður tí fast við niðurstøðuna um, at talan er um eitt innanhýsis skjal, ið alment innlit ikki verður givið í.
> ..."

Tann 22. apríl 2021 sendi klagarin Almannamálaráðnum soljóðandi teldupost:

> "...
> Takk fyri teldupostin. Eg eri tó framvegis ikki samdur við tíni støðutakan.
>
> Keldur upplýsa fyri okkum, at har liggur eitt frámæli/notat, har ráðið ivast í valinum av ... til stýrislim í Bústaðir. Tað halda vit vera av stórum og almennum týdningi fyri málið.
>
> Tí vil eg hava teg at vátta ella avsanna, at eitt slíkt notat fyriliggur. Kanst tú tað?
> …"

**Partshoyring**
Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 27. apríl 2021, varð klagan send Almannamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 1 viku. Samstundis varð Almannamálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 6. mai 2021 sendi Almannamálaráðið umboðsmanninum frágreiðing og skjalatilfar í sambandi við málið.

Av tí at frágreiðingin og skjalatilfarið ikki vístu annað enn tað, ið longu frammanundan er lýst undir "Málsgongd", metti umboðsmaðurin, at víðari partshoyring ikki var neyðug.

**Niðurstøða**
Hendan klagan snýr seg um avgerð hjá Almannamálaráðnum at nokta klagaranum innlit í eitt skjal, ið Almannamálaráðið metir er eitt innanhýsis arbeiðsskjal, ið innlit ikki verður veitt í.

Ræturin til innlit fevnir sum útgangsstøði um øll skjøl, sum myndugleikin hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari málsviðgerð, sambært §§ 4, stk. 1, 1. pkt. og 5, nr. 1 í innlitslógini (Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001).

*Innanhýsis arbeiðsskjal*
Ásetingin í § 7 í innlitslógini, sum Almannamálaráðið grundar avgerð sína á, heimilar myndugleikanum at skerja rættin til skjalainnlit í tey skjøl, sum nevnd eru í ásetingini. Heimildin loyvir, at slík skjøl verða undantikin í síni heild. Tó kunnu í hesum skjølum vera upplýsingar um veruligar umstøður, ið ikki eiga at vera fevndar av skerda skjalainnlitinum í § 7, men latnar sambært § 11, stk. 1.

§ 7, nr. 1 í innlitslógini er soljóðandi:

> "§7. Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Innanhýsis arbeiðsskjøl eru
> 1) skjøl sum verða gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu ..."

Ásetingin er ætlað at verja innanhýsis avgerðargongdina hjá myndugleikanum.
Eftir at hava hugt eftir umrødda skjalinum eri eg av tí fatan, at talan er um eitt skjal, ið lýsir meiningar og metingar hjá ráðnum. Eg haldi, at skjalið er gjørt til egna nýtslu hjá ráðnum og tískil er at meta sum eitt innanhýsis arbeiðsskjal í Almannamálaráðnum.

Eg eri tí samd við avgerðini hjá Almannamálaráðnum at nokta klagaranum innlit vísandi til § 7, nr. 1 í innlitslógini.

Tá ið skjøl eru fevnd av undantakinum til skjalainnlit sambært § 7, skal myndugleikin meta um, um tað eru ítøkiligar upplýsingar í skjølunum, ið skulu latast sambært § 11, stk. 1 í innlitslógini, ið er soljóðandi:

> "§ 11. Upplýsingar í skjølum, ið eru umfatað av § 7 og § 10, nr. 1-4, um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið, skulu hóast hesar ásetingar latast í samsvari við vanligu reglur lógarinnar."

Eftir at hava hugt eftir umrødda skjalinum kann eg staðfesta, at skjalið ikki inniheldur upplýsingar um veruligar umstøður, sum innlit sambært § 11 stk. 1 eigur at verða latið í.

Sambært § 4, stk. 1, 2. pkt í innlitslógini kann ein myndugleiki loyva skjalainnliti í størri mun, enn lógin ásetir, um ikki annað fylgir av reglunum um tagnarskyldu v.m. Hetta merkir, at hóast eitt mál, skjøl ella upplýsingar sambært innlitslógini eru undantikin frá rættinum til innlit, so kann myndugleikin eftir umstøðunum gera av at veita innlit í hesi. Hetta kallast eisini meginreglan um meirinnlit.

Á s. 64 í "Betænkning om Offentlighedsloven, betænkning nr. 1510" stendur m.a. soleiðis um galdandi rætt í Danmark viðvíkjandi hesum evninum, ið samsvarar við tað, ið er galdandi í § 4, stk. 1, 2. pkt. í innlitslógini:

> "...

> • Det følger i øvrigt af meroffentlighedsprincippet, at en myndighed af egen drift – dvs. også i tilfælde, hvor et ønske om meroffentlighed ikke specifikt er fremsat i en begæring om aktindsigt – bør overveje, om der bør gives meroffentlighed.
> • Meroffentlighedsprincippet indebærer, at en forvaltningsmyndighed kan vælge at give aktindsigt, selvom der ikke er ret til aktindsigt i vedkommende sag, dokumenter eller oplysninger. Ved vurderingen af, om der i sådanne tilfælde bør gives meroffentlighed, foretages der en afvejning af på den ene side hensynet til navnlig de beskyttelsesinteresser, der ligger bag relevante undtagelsesbestemmelser, og på den anden side hensynet til de interesser, der ligger bag begæringen om aktindsigt.
> • Forvaltningsmyndighederne kan dog alene meddele meroffentlighed under iagttagelse af reglerne om tavshedspligt mv. Dette indebærer, at myndighederne i forbindelse med anvendelsen af meroffentlighedsprincippet skal respektere de almindelige regler om tavshedspligt i straffeloven og forvaltningsloven samt særlige regler om tavhedspligt.
> …"

Sum umboðsmaður kann eg kanna, um ein myndugleiki hevur umhugsað at veita meirinnlit, og um myndugleikin í hesum sambandi hevur tikið viðkomandi og saklig atlit.

Sum greitt er frá undir "Málsgongd" omanfyri, tekur Almannamálaráðið støðu til spurningin um meirinnlit tann 22. apríl, aftaná at klagarin, tann 21. apríl, hevur sett fram umbøn um meirinnlit í umrødda skjalið.

Eg haldi, at Almannamálaráðið longu tann 19. apríl átti at havt eina neyvari grundgeving fyri at nokta fyri innliti. Eisini átti Almannamálaráðið tann 19. apríl at tikið støðu til og grundgivið ítøkiliga fyri, um meirinnlit kundi verið veitt í sambandi við innlitsumbønina hjá klagaranum, hetta uttan mun til um umbønin um innlit ikki snúði seg um meirinnlit.

Av tí at Almannamálaráðið ikki hevur givið nakra grundgeving fyri sínari støðutakan, um ikki at lata meirinnlit í umrødda skjalið, fái eg heldur ikki mett um, hvørt Almannamálaráðið hevur tikið viðkomandi og saklig atlit, í mun til avgerðina um ikki at veita meirinnlit.

*Setanarmál*
Hóast eg omanfyri staðfesti, at skjalið er eitt innanhýsis skjal, ið er undantikið innliti sambært § 7 í innlitslógini, er eisini viðkomandi at hyggja nærri eftir, um talan møguliga eisini er um eitt skjal, ið er knýtt at einum setanarmáli, ið snýr seg um val av stýrislimum í stýrið fyri almenna bústaðarfelagið, Bústaðir.

Sambært § 2, stk. 1 í innlitslógini eru mál um setan í starv ella flytan í hægri starv ikki fevnd av innlitslógini, tó undantikið § 6 í innlitslógini, ið eisini er galdandi fyri slík mál.

Á s. 53 í "Betænkning om Offentlighedsloven, betænkning nr. 1510" stendur m.a. soleiðis um galdandi rætt í Danmark viðvíkjandi hesum evninum, ið samsvarar við tað, ið er galdandi í § 2, stk. 1 í innlitslógini:

> "…

> • Bestemmelsen er begrundet i såvel offentlige som private interesser. Den skal således dels sikre, at det offentlige kan tiltrække kvalificerede ansøgere, dels at ansøgeres private forhold ikke offentliggøres.
> • Bestemmelsen omfatter alle former for ansættelser i den offentlige forvaltning, herunder tjenestemandsansættelser og overenskomstansættelser.
> • Udtrykket ansættelse skal i øvrigt fortolkes bredt, således at det ikke blot omfatter typiske sager om ansættelse i det offentlige, men også sager om udpegning af medlemmer til offentlige udvalg.
> • Retsvirkningen af, at en sag er omfattet af undtagelsesbestemmelsen, er, at samtlige sagens dokumenter er undtaget fra aktindsigt efter offentlighedsloven.
> ...”

Í FOB nr. 98.167 og FOB nr. 99.516, tulkar danski umboðsmaðurin, hvat orðingin “setan í starv” fevnir um. Brot úr niðurstøðu hansara ljóðar soleiðis:

> “...
> En almindelig sproglig fortolkning af ordet fører efter min opfattelse nærmest til en formodning om at en situation som den foreliggende ikke har karakter af 'ansættelse'; en 'ansættelse' indebærer typisk at der etableres et over- og underordnelsesforhold mellem en ansat og dennes arbejdsgiver, ligesom en 'ansættelse' mest almindeligt finder sted efter ansøgning. Der er imidlertid ikke i loven eller forarbejderne holdepunkter for at antage at det har været hensigten at afgrænse bestemmelsens anvendelsesområde så snævert som til sådanne typiske ansættelsessager.
> ...”

Omanfyrinevndu mál hjá danska umboðsmanninum snúðu seg ávikavist um val av limum í kanningarnevndina, ið kannaði føroyska bankamálið, og val av limum til danska “Højskoleudvalget”.

Bæði í FOB nr. 98.167 og FOB nr. 99.516 kom danski umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at talan samanumtikið var um setanir, ið ikki vóru fevndar av donsku innlitslógini. Hóast hann ikki var heilt ivaleysur, so metti hann tó, at ávís viðurskifti talaðu fyri, at hann ikki kundi finnast at avgerðunum hjá ávikavist danska løgmálaráðnum og danska undirvísingarmálaráðnum um ikki at veita klagarunum innlit ella meirinnlit í málini.

Soleiðis sum málið er lýst, kann eg ikki útihýsa, at talan í hesum føri er um eitt mál, ið er fevnt av § 2, stk. 1 í innlitslógini og sostatt í høvuðsheitum undantikið almennum innliti.

Hóast eitt mál er fevnt av § 2, stk. 1 í innlitslógini, kann myndugleikin tó meta um meirinnlit skal latast í skjøl ella upplýsingar, ið knýtt eru at málinum.

Av tí at Almannamálaráðið ikki hevur givið nakra grundgeving fyri sínari støðutakan, um ikki at lata meirinnlit í umrødda skjalið, fái eg heldur ikki gjørt mær nakra meting, um tey atlit, ið Almannamálaráðið hevur tikið, umframt at vera viðkomandi og saklig, eisini kunnu setast í samband við, at skjalið er knýtt at einum máli, ið er fevnt av § 2, stk. 1 í innlitslógini.

Vísandi til omanfyristandandi fari eg at heita á Almannamálaráðið um at geva klagaranum eina grundgeving fyri, hví Almannamálaráðið ikki ynskir at lata meirinnlit í málið.

Eg fari at biðja Almannamálaráðið lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður